**Máltindurin 1. deild**

| | | |
|---|---|---|
| Andrew av Fløtum | HB | 6 |
| Krzystof Popczynski | GÍ | 5 |
| Birgir Jørgensen | VB | 5 |
| John Petersen | B36 | 4 |
| Heðin á Lakjuni | B36 | 4 |
| Karsten From | HB | 4 |
| Hjalgrím Elttør | KÍ | 4 |
| Helgi L. Petersen | NSÍ | 4 |
| Hans Pauli Samuelsen | EB/S | 3 |
| Jens Kristian Hansen | B36 | 2 |
| Sjálvmál | B68 | 2 |
| Súni Fríði Johannesen | B68 | 2 |
| Magni á Lakjuni | EB/S | 2 |
| Egil á Bø | EB/S | 2 |
| Sorin Anghel | EB/S | 2 |
| Elfinn Ørvarodd | FSV | 2 |
| Eyðfinn Fjalsbak | FSV | 2 |
| Bartal Eliasen | GÍ | 2 |
| Símun Samuelsen | GÍ | 2 |
| Súni Olsen | GÍ | 2 |
| Rógvi Jacobsen | HB | 2 |
| Rókur F. Jespersen | HB | 2 |
| Rúni Nolsøe | HB | 2 |
| Atli Danielsen | KÍ | 2 |
| Jústinus R. Hansen | NSÍ | 2 |
| Sonni L. Petersen | NSÍ | 2 |
| Christian Høgni Jacobsen | NSÍ | 2 |
| Milan Kulic | VB | 2 |

**Máltindurin 2. deild**

| | | |
|---|---|---|
| Eirikur Joensen | Sumba | 7 |
| Eyðun Samuelsen | AB | 5 |
| Kaj Roest | TB | 4 |
| Áki Mørk | B36 | 3 |
| Hanus Eliasen | ÍF | 4 |
| Allan Michelsen | TB | 4 |
| Heini Heinason | ÍF | 3 |
| Allan Poulsen | TB | 3 |
| Sigmund Mikkelsen | VB | 3 |
| Jan Jørgensen | AB | 2 |
| Johnny Samuelsen | AB | 2 |
| Pætur Dam Jacobsen | AB | 2 |
| Bárður Mortansson | B36 | 2 |
| Johan Dávur Højgaard | B68 | 2 |
| Tummas Pauli Olsen | B71 | 2 |
| Høgni Zachariasen | ÍF | 2 |
| Ken Bærendsen | ÍF | 2 |
| Marius N. Hansen | KÍ | 2 |
| Bergur Djurhuus | Sumba | 2 |
| René Thomsen | Sumba | 2 |
| Sonni Kjærbo | Sumba | 2 |
| Dan Mortensen | TB | 2 |
| Óli Johannesen | TB | 2 |
| Rasmus Nolsøe | TB | 2 |
| Bergur Vinter | VB | 2 |
| Jón Gærdbo | VB | 2 |
| Jón Pauli Olsen | VB | 2 |
| Per Joensen | VB | 2 |

# Grindavík vil hava Hjalgrím



*Grindavík hevur eftir øllum at døma Hjalgrím Elttør úr KÍ á sínum ynskilista*

**Men enn hevur KÍ álopsmaðurin ikki tikið støðu til, um hann skal taka av tilboðnum úr Íslandi**

SÁTTMÁLATILBOÐ
*Jóannes Hansen*

Grindavík í bestu íslendsku fótbóltsdeildini vil hava Hjalgrím Elttør at vera teirra álopsvápn eftir hálvan juli. Stjórin í felagnum, Ingvar Guðjónsson, var í Klaksvík sunnudagin, og hann sá mannin, sum teir í Grindavík halda kann gerast loysnin upp á álopstrupulleikarnar hjá teimum, staðfesta 2–0 heimasigurin ímóti FS Vágum.

Í Grindavík eru teir altráðir eftir at fáa ein nýggjan álopsspælara, eftir at besti málskjúttin hjá teimum í fjør, Grétar Hjartarson, er vorðin so mikið skaddur, at tað ikki ber honum til at spæla í ár.

## Dregur á bæði

Hjalgrím Elttør váttar, at hann sunnudagin heilsaði upp á umboð fyri Grindavík. Men talan var ikki um samráðingar.

– KÍ hevur fingið eitt tilboð upp á meg. Eg havi skilt, at KÍ ikki fer at seta seg ímóti, um eg fái tilboð at fara aðra staðni, men sjálvandi skulu teir hava eitt endurgjald, sum teir kunnu liva við. Tað mugu KÍ og Grindavík finna út av. So fæst at síggja, um Grindavík og eg kunnu finna út av treytunum fyri samstarvi okkara millum.

Tá ið vit spyrja Hjalgrím, um hann veruliga hevur hug at fara til Íslands og spæla við Grindavík, sum er á 8. plássinum og harvið dygst omanfyri niðurflytingarstrikuna, so ásannar hann, at hann dregur á bæði.

– Kanska er støðið eitt vet hægri í Íslandi, enn tað er hjá okkum, men tað sigst ikki vera tann stóri munurin. Eg havi tað gott í KÍ, og næsta vikan fer at vísa, um vit eftir summarfrítíðina fara at vera við í kappingini um FM heitið. Eg kundi eisini hugsað mær at verið við, tá ið KÍ fer at spæla í UEFA Cup ímóti Molde. Á hinari síðuni er spurningurin, um eitt tíðarskeið í Íslandi ber betri møguleikar við sær at sleppa longri úti Europa, enn tað ger at spæla við KÍ. Tað eru hesi viðurskiftini, sum tað skal hugsast um næstu vikurnar.

Nær verður avgerðin tikin?

– Tað er ikki møguleiki at sleppa til Íslands fyrrenn eftir hálvan juli, so tað verður gjørt av, tá ið kappingin í Føroyum fer í summarfrí. Íslendski umboðsmaðurin fór til Havnar aftur sunnukvøldið, og hann skuldi mánadagin tosa við Jákup í Stórustovu, sum er umboðsmaður hjá mær.

Tað vil siga, at síðsti dysturin hjá tær fyri KÍ verður annað mikukvøld, tá ið GÍ fer at spæla í Klaksvík?

– Tað er ein møguleiki fyri tí, men tað er eingin avgerð tikin um tað.

Gestur Hovgaard, formaður í KÍ, sigur, at teir hava fingið eitt tilboð upp á Hjalgrím frá Grindavík, sum teir ikki kunnu liva við. Hann sigur seg kortini ikki ivast í, at tað fer at bera til at finna eina loysn, um Hjalgrím veruliga ynskir at sleppa til Íslands.

– Vit hava leingi vitað, at Hjalgrím miðjar eftir at sleppa út um landoddarnar at royna fótbóltsevnini, og vit hava ikki æltað okkum at sett honum forðingar í vegin. Men tað sigur seg sjálvt, at vit vilja hava eitt rímuligt endurgjald.

## Á veg fram

Í vikuskiftinum hevur ikki verið spælt í Íslandi. Teir spæla fyri tað mesta mitt í viku, og tað er ofta ein dystur á skránni hvørt kvøldið.

Grindavík er framvegis við í steypakappingini, og teir skulu – á sama hátt sum KÍ – royna seg í UEFA Cup. Í landskappingini eru teir nummar átta, men teir halda tað ganga rætta vegin. Í síðstu viku vunnu teir 2–1 á KR í Reykjavík.

**Støðan, 1. deild menn**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 HB | 7 | 4 | - | 3 | - | 0 | 19 | 8 | 11 | 15 |
| 2 KÍ | 7 | 4 | - | 2 | - | 1 | 9 | 9 | 0 | 14 |
| 3 B36 | 7 | 4 | - | 1 | - | 2 | 15 | 6 | 9 | 13 |
| 4 NSÍ | 8 | 3 | - | 4 | - | 1 | 14 | 8 | 6 | 13 |
| 5 GÍ | 7 | 3 | - | 2 | - | 2 | 12 | 10 | 2 | 11 |
| 6 B68 | 7 | 2 | - | 4 | - | 1 | 6 | 5 | 1 | 10 |
| 7 EB/Streymur | 7 | 2 | - | 3 | - | 2 | 11 | 13 | -2 | 9 |
| 8 FS V | 7 | 2 | - | 1 | - | 4 | 8 | 14 | -6 | 7 |
| 9 VB | 7 | 1 | - | 2 | - | 4 | 8 | 15 | -7 | 5 |
| 10 Skála | 8 | 0 | - | 0 | - | 8 | 2 | 16 | -14 | 0 |

**Støðan, 2. deild menn**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 ÍF | 7 | 6 | - | 1 | - | 0 | 16 | 5 | 11 | 19 |
| 2 Sumba | 7 | 4 | - | 2 | - | 1 | 19 | 4 | 15 | 14 |
| 3 TB | 7 | 4 | - | 1 | - | 2 | 17 | 11 | 6 | 13 |
| 4 AB | 7 | 3 | - | 3 | - | 1 | 14 | 7 | 7 | 12 |
| 5 VB | 7 | 3 | - | 1 | - | 3 | 12 | 9 | 3 | 10 |
| 6 LÍF | 7 | 3 | - | 1 | - | 3 | 8 | 14 | -6 | 10 |
| 7 KÍ | 7 | 3 | - | 0 | - | 4 | 12 | 24 | -12 | 9 |
| 8 B36 | 7 | 1 | - | 3 | - | 3 | 9 | 11 | -2 | 6 |
| 9 B71 | 7 | 1 | - | 1 | - | 5 | 3 | 10 | -7 | 4 |
| 10 B68 | 7 | 0 | - | 1 | - | 6 | 4 | 19 | -15 | 1 |



# Avgrevstur steðgaður

**Í sambandi við Norðoyatunnilin hava fornfrøðingar grivið svørðin av, har vegurin til og frá tunlinum skal ganga, men mikudagin steðgaði ein av lendiseigarunum arbeiðinum, tí viðkomandi hevði onki fingið at vita um henda avgrevsturin**

NORÐOYATUNNIL
*Solby A. Eliasen*



*Mikudagin steðgaði ein av teimum mongu eigarunum á Gerðabøi í Klaksvík arbeiðinum hjá fornfrøðingunum á hansara lendi, tí hesin hevði onga fráboðan hevði fingið um hetta arbeiðið*

**Klaksvík:**
Í eina tíð nú hava fólk frá Fornminnissavninum arbeitt á Gerðabø, har tey grava svørðin av fyri at kanna um nakað fornfrøði-ligt virði liggur á lendinum. Hetta arbeiðið bleiv steðgað av einum av teimum mongu eigarunum á hesum økinum mikudagin. Viðkomandi eigari, Jóhan Joensen úr Klaksvík, hevði ikki frætt eitt orð um hetta arbeiðið, og tí steðgaði hann arbeiðinum alt fyri eitt.

– Einaferð fyri jól bleiv eg uppringdur av einum manni frá Norðoyatunlinum, sum segði, at hann arbeiddi við at fáa nøkur brøv send út til eigararnar. Hann ringdi til mín, tí eg siti sum formaður í hagastýrinum í Uppsala-haganum, og honum tørvaði nakrar upplýsningar, greiðir hann frá.

Jóhan sigur, at hetta er ein spurningur um prinsipp. Hann sigur, at hann hevur ikki nakað sum helst ímóti, at tað verður grivið á hansara lendi, og somuleiðis heldur hann ikki, at nakar av hinum eigarunum hevur tað heldur, men teir halda allir, at tað er nógv fyri, at tað verður grivið á teirra lendi, uttan at tað verður boðað frá tí frammanundan.

– Um teir so ringdu til mín aftur fríggjadagin, so hevði eg óivað játtað teimum at grivið á mínum lendi, men tað hava tey so heldur ikki gjørt, sigur Jóhan Joensen.

Sostatt liggur arbeiði á Gerðabø nú stilt, og tað verður liggjandi, inntil hesi viðurskifti eru komin upp á pláss.

Sum Sosialurin skilir, so er tað ikki bara Jóhan, sum ikki hevur fingið fráboðan um hetta arbeiðið. Onkur annar eigari var eisini komin framvið og hevði spurt, hvat gekk fyri seg. Men har fingu tey so loyst trupulleikarnar og arbeiðið kundi halda fram. Sigast skal tó, at tað letur til, at tað møguliga bert var tann eini ella báðir tveir av eigarunum, har tað longu er grivið, sum høvdu fingið fráboðan áðrenn.

Einir 80 til 100 eigarar eru á økinum, har vegurin skal ganga, so tað var bert ein spurningur um tíð, inntil tann fyrsti gjørdi vart við seg. Teir flestu sáa á lendinum og plaga at nýta grasið til seyð, men í ár fáa teir, har tað longu er grivið ikki nógv burturúr. Men tað heldur Jóhan ikki er tann størsti trupulleikin í hesum.

– Trupulleikin er hann, at tað varð farið inn á ognarjørð at gera eitt arbeiði, uttan at vit eigarar fingu nakað at vita, staðfestir hann og leggur afturat, at hann ikki skilir p/f Norðoyatunnilin, at tey ikki hava gjørt meira og brúkt ta longri tíð upp á at fáa hesi viðurskifti í rættlag, tí so kundi arbeiðið byrja tað seinni, men hildið ótarnað fram.
Vegurin, sum gerast skal gongur frá Gerðabø tvørtur um Eiði og yvir í Uppsalahagan, og sum sagt, so eru tað eitt ótal av eigarum á hesum økinum. Á kunnandi fundinum, sum p/f Norðoyatunnilin hevði í Klaksvík reisti ein av eigarunum nevniliga henda spurningin um, hvussu felagið ætlaði at tryggja sær, at allir eigararnir fóru at verða vitandi um tað, sum fyriferst. Tað lat til, at hesin visti betur enn teir, sum sótu har á fundinum og kunnaðu, og í dag kunnu vit bara staðfesta, at so var.

## Kleyvarskapur

Tað eydnaðist ikki Sosialinum at fáa fatur á Dávur Reinert Hansen, stjóra í p/f Norðoyatunlinum, men við Norðlýsið fríggjadagin sigur hann, at talan er um kleyvarskap onkrastaðni.

Dávur sigur somuleiðis, at tað ikki er greitt, hvat hetta kemur at týða fyri arbeiðið framyvir meira enn at tað fornfrøðiliga arbeiðið nú verður nakað seinkað.

Um hetta kemur at hava nakran týdning fyri sjálva vegagerðina, visti hann ikki at siga fyri vissu.

Men sum nú er stendur gravkúgvin á Gerðabø pinnastill.

# Átta posthús fylla 100

POSTSØGA
*Tíðindaskriv*

Í dag er veitsludámur á átta posthúsum á bygd, tí í dag fylla posthúsini á Strondum, á Sandi, á Eiði, í Hvalba, í Fuglafirði, í Vestmanna, í Vági og í Miðvági 100 ár. Hesi posthúsini halda dagin og bjóða vaksnum og børnum at vera vælkomin at støkka inn á gólvið til ein kaffimunn við onkrum leskiligum afturvið. Tey vitjandi kunnu eisini fáa ballónir og plakatir við sær heim.

Eisini verður møguligt at keypa postkort við frímerkjum og serstempli, ið eru framleidd til hetta serstaka høvið. Hetta serstaka stemplið er bert møguligt at fáa sjálvan føðingardagin 1. juli. Tey viðskiftafólk, ið ynskja øll 8 stemplini, biðjast venda sær til Frímerkjadeildina á Argjum telefonnummar 346200.

Postverkið lýsti fyrr í ár eftir myndum til frímerkjaarkið, ið ætlanin var at geva út. Vit takka øllum teimum, ið lótu myndir inn. Myndirnar, ið brúktar eru til frímerkjaarkið, komu allar frá fornminnissavninum.

